**UTTAN ÚR HEIMI**

## Kann venda ES á høvdið

Seinastu tíðina hava leiðararnir í ES-londunum fleiri ferðir róst turkisku stjórnini, tí hon hevur framt fleiri nýskipanir, sum tryggja borgarunum fleiri rættindi. Júst hetta er neyðugt, skal Turkaland sleppa til samráðingarborðið um limaskap í ES, men tað verður kortini neyvan í bræði.

Sigur eitt av teimum 25 limalondunum nei, verða ongar samráðingar við turkar, og nú sigur eysturríkski forsetin, at tíðin er ikki búgvin enn. Heinz Fischer, forseti, sigur, at tað er ikki bara Turkaland, sum skal fyrireika seg til limaskap í ES, men at samveldið sjálvt má fyrireika seg, skal Turkaland sleppa uppí.

– Vita tosa um eitt land, har 70 milliónir fólk búgva. Turkaland kann broyta javnvágina í samveldinum. Ja, tað kann venda øllum ES á høvdið, sigur eysturríkski forsetin við turkiska blaðið Aksam.

## Renna til lækna

Fyri tíggju árum síðani tosaðu danir vanliga fimm ferðir um árið við læknan, men nú er ein telefonsamrøða ella ein vitjan komin afturat.

Tað merkir kortini ikki, at danir líða meiri av sjúku nú enn fyri tíggju árum síðani. Tvørturímóti er tað so, at tess betur fólk hava tað í gerandisdegnum, tess oftari leita tey sær til læknan, sigur stovnurin DSI, sum hevur kannað málið. Tað kemst av, at fólk hugsa meiri um heilsuna nú enn fyrr, og soleiðis verður tað eisini í framtíðini, sigur stovnurin. Tað eru kortini ikki øll, sum eru líka íðin at ganga til lækna. Summi gera tað í so ofta, onnur í so sjáldan.

Tann stóri áhugin fyri heilsuni kemur eisini læknunum væl við. Fyri tíggju árum síðani fingu læknarnir 2,4 milliardir krónur í samsýning, men í fjør var hetta talið komið upp á 3,7 milliardir krónur, skrivar Jyllandsposturin.

## Yukos nærri loysn

Russisku myndugleikarnir royna nú at finna eina loysn, sum sleppast kann undan at koyra tað stóra oljufelagið Yukos á húsagang.

Russiska skattavaldið er komið eftir, at Yukos skal gjalda meiri enn 20 milliardir krónur í skatti, sum felagið hevur skákað sær undan at gjalda. Tað megnar felagið ikki, og skattavaldið hevur tí hótt við at koyra tað á húsagang. Men í gjár segði russiski fíggjarmálaráðharrin, Aleksej Kudrin, at roynt verður at finna eina aðra loysn.

Hildið verður, at oljufelagið sleppur at selja ein part av sínum ognum fyri at útvega pengar til skattarokningina. Fyri nøkrum døgum síðani segði Vladimir Putin, forseti, at stjórnin hevur ongan áhuga í at koyra eitt felag sum Yukos á húsagang. Orð hansara høvdu við sær, at virðið á partabrøvunum í felagnum hækkaði sjey prosent.

## Liva leingi í Avstralia

Hóast fólk í Avstralia røra seg minni og eru feitari nú enn fyrr, liva tey longri enn nakrantíð.

Í einari frágreiðing hjá heilsustovninum stendur, at avstraliumenn hava tað gott, men at fleiri avbjóðingar eru. Royking er ein av avbjóðingunum, men frágreiðingin sigur eisini, at avstraliumenn røra seg ov lítið, og at nógv eru ov væl í holdum. Kortini liva fólk longri enn nakrantíð fyrr. Meðalaldurin hjá kvinnunum er oman fyri 82 ár, og avstralsku menninir liva í meðal 77,4 ár. Tað merkir, at tað eru bara japanar, íslendingar og sviar, sum liva longri enn avstraliumenn.

Hjartasjúkur eru tann mest vanliga deyðsorsøkin í Avstralia, men fleiri doyggja eisini av krabbameini. Roykingin er tann stóri trupulleikin, men vantandi rørsla og ov høgt blóðtrýst gera eisini sítt.

# Átta bretskir herflotamenn fangar í Iran

**IRAK-KRÍGGIÐ**
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Myndugleikarnir í Iran hóttu í gjár við at rættarsøkja átta bretskar herflotamenn, sum iranar tóku í Shatt-al-Arab-sundinum mánadagin. Teir átta menninir vóru í trimum smáum hernaðarbátum, sum sambært iransku myndugleikunum vóru komnir inn um iranska markið.

Bretar siga, at teir bretsku herflotamenninir vóru í ferð við at læra irakar, hvussu teir skulu røkja vaktarhaldið á sjónum, nú irakar taka við valdinum í Irak. teir tríggir bátarnir vóru óvápnaðir.

Bretski uttanríkisráðharrin, Jack Straw, tingaðist í gjár við myndugleikarnar í teheran fyri at fáa teir at lata teir átta menninar leysar.

# Clinton stjelur myndina




*Áhugin fyri nýggju ævisøguni hjá Bill Clinton er so stórur, at hon verður endurprentað beinanvegin*

**Tann nýggja bókin hjá fyrrverandi forsetanum hevur fingið amerikanararnar at gloyma alt um forsetavalið í heyst**

**BÓKAÚTGÁVA**
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Í hesum døgum tosa amerikanarar ikki um nógv annað enn ævisøguna hjá fyrrverandi forsetanum Bill Clinton. Tann 950 síður stóra bókin »My Life« kom í bókasølurnar í USA í gjár, og fólk stóðu í røð fyri at fáa fatur á henni.

Seinastu dagarnar hevur Bill Clinton verið á sjónvarpsskíggjanum og í bløðunum hvønn einasta dag, og tað hevur gjørt, at amerikanararnir hava gloymt alt um, at teir skulu velja forseta í heyst, skrivar Reuter-tíðindastovan. Tað hóvar ikki hansara gomlu konservativu mótstøðumonnum, sum bera ótta fyri, at tann nógva umrøðan skal blása nýtt lív í tann demokratiska flokkin bert fáar mánaðir undan forsetavalinum.

Fyri at forða hesum er ein konservativur felagsskapur farin undir eitt átak ímóti Clinton. Í sjónvarpslýsingum verður sagt, at fyrrverandi forsetin gjørdi einki fyri at forða álopinum á USA tann 11. september í 2001. Onnur, sum finnast at Clinton, hava broytt navnið á bók hansara frá »My Life« (Mítt lív) til »My Lie« (Mín lygn).

# Fleiri ríkmenn í Moskva enn í New York

**Russar keypa Ferraribilar og aðrar dýrar vørur sum ongantíð fyrr, og nú eru fleiri milliardingar í Moskva enn í New York**

**RÍKIDØMI**
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Fyri bara fýra mánaðum síðani hevði eingin býur í heiminum so nógvar milliardingar sum New York, men nú er Moskva farin framum. Sambært amerikanska tíðarritinum Forbes eiga 36 russar nú meiri enn eina milliard dollarar í part, og teir búgva allir í høvuðsstaðnum Moskva. Í New York eru teir 31 í tali.

Tann ríkasti russin er oljumaðurin Mikhail Khodorkovskij, sum eigur 15,2 milliardir dollarar. Hann hevur kortini ikki nógva gleði av pengunum júst nú, tí hann situr í fongsli ákærdur fyri skattasvik.

Næstríkastur er Roman Abramovitsj, sum er kendur í Vesturheiminum, tí hann eigur enska fótbóltsfelagið Chelsea. Sambært Forbes eigur hann 12,5 milliardir dollarar.

Tað er ikki heilt rætt at tosa um russiskar ríkmenn, tí á triðja plássi hjá Forbes er tann 41 ára gamla Jelena Baturina. Hon eigur sambært Forbes átta milliardir dollarar. Ein stóran part av pengunum skal hon hava fingið burtur úr byggisáttmálum hjá kommununi í Moskva, har maður hennara er borgarstjóri.

ítróttur
Nr. 117 • mikudagur • 23. juni 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

# Heldur ikki hesa ferð var talan um plettskot

**Bíðitíðin skuggaði enn eina ferð yvir spenningin, og tað vóru enn eina ferð trupulleikar við fasta startinum**

**FM-KAPPRÓÐUR**
*Jóannes Hansen*



*Tað gekk ógvuliga striltið hjá startdómaranum at fáa sett róðrarnar í gongd*

*mynd: Álvur Haraldsen*

Felags fyri tær tríggjar FM stevnurnar, sum higartil eru avgreiddar, er, at bíðitíðin hevur verið long, og at tað hava verið trupulleikar. Á Skálafjørðinum kendu teir seg eftir fleiri royndir noyddar at sleppa fasta startinum, og soleiðis var tað eisini á Hvalvík.

10-mannaførini komu ikki á mál fyrrenn klokkan var næstan tíggju minuttir í sjey. Serliga var tað í sambandi við dreingjaróðurin, at trupulleikarnir vóru stórir. Frá tí, at tað sambært skránni skuldi farast undir kappróðurin klokkan trý, gekk ein heilur klokkutími, áðrenn farið varð undir fyrsta FM róðurin. Tá hevði verið roynt við føstum starti í góða løtu og síðani við leysum starti. Tað var ikki fyrrenn á 1500 og 2000 metra málunum, at fasti starturin aftur varð nýttur.

Felags fyri róðrarlíkindini á trimum teimum fyrstu FM stevnunum hevur verið, at tey ikki hava verið heilt optimal, men tey hava heldur ikki verið vánalig.

Trupulleikin við fasta startinum í Hvalvík hevði ikki bara við líkindini at gera. Róðrarfólkini vóru heldur ikki heilt nøgd við umstøðurnar inni á róðrarøkinum, har tað varð hildið at vera í so trongt við dráttin, og har bátarnir stóðu.

Tey seinastu árini hevur tað ferð eftir ferð verið hugaligt at staðfesta, at tað hevur gingið støðugt framá við FM kappróðrunum.Tað hevur tykst sum um vertsfeløgini hava kappast um at vera so tætt at ásettu tíðini við fyrsta startskotinum, sum tað á nakran hátt hevur borið til, og í fleiri førum hevur klokkan ikki verið meiri enn hálvgum fimm, tá ið síðsti róðurin hevur verið í gongd. Tað hava feløg og fyrireikarar fingið rós fyri.

Róðrarsambandið hevur aftur og aftur undirstrikað, at tað skal miðjast eftir og arbeiðast fram ímóti, at fyrireikingarnar verða so dyggar, at tað so vítt, sum tað á nakran hátt ber til, bara skal bíðast eftir høvuðsdómarabátinum og útvarpsbátinum, áðrenn startskotið verður latið av fyri næsta róðrinum. Hetta málið hevur so langt í frá verið rokkið seinastu ferðirnar.

Fasti starturin ætlast at vera amboð fyri at fáa bátarnar at liggja so væl, sum tað ber til, og at fáa teir so skjótt, sum tað ber til, at liggja væl. Tær báðu seinastu ferðirnar hava royndirnar at fáa fasta startin at rigga verið viðvirkandi til, at bíðitíðin hevur verið so long, sum hon ikki so ofta hevur verið.

Eftir kappingina á Skálafjørðinum varð sagt, at Róðrarsambandið bíðaði eftir skrivligum frágreiðingum frá dómara og lokala fyrireikaranum, áðrenn teir komu við nakrari frágreiðing og kanska niðurstøðu um róðurin. Enn hevur tað ikki borið til at frætta nakað um hetta.

Á Jóansøku í Vági nú leygardagin fer bara at verða kappast á 1000 metrum. Róðrarmálið verður innanfyri grótkastið á vestara landinum. Tí kann tað ikki roknast við øðrum, enn at tað leygardagin fer at ganga væl skjótari at fáa kappingarnar frá hondini, enn tað higartil hevur verið gjørt.

Góðum summarveðrið hevur tað higartil verið millum lítlum og ongum av. Nú man góðveðurs kvotan, sum føroyingar eiga á, vera stór, og tað hevði ikki verið av leið, um ein partur av henni varð nýttur nú leygardagin. Kappróðrarfólkini og fyrireikararnir hava uppiborið eitt róðrarligt plettskot, tá ið tað ræðum um umstøðurnar at rógva og kappast.

# Høvuðsstaðurin eigur allar vinnararnar

**Fyri fyrstu ferð í fýra ár eydnaðist tað ikki Havnar Róðrarfelag at vinna nakran róður. Kappingina fingu teir í HR frá hinum feløgunum í høvuðsstaðnum, sum vunnu allar róðrarnar**

**FM KAPPRÓÐUR**
*Jóannes Hansen*




*Kvinnurnar umborð á Jarnbardi hava fingið fulla úrtøku burtur úr teimum trimum fyrstu FM-róðrunum í ár*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

FM kappróðurin og serliga kappingin um fremstu plássini og harvið sigrarnar er fyrst og fremst ein kapping millum bátar og manningar í høvuðsstaðnum og í Suðurstreymi. Á Skálafjørðinum vóru allir vinnararnir úr høvuðsstaðnum, og tað vóru teir eisini í Hvalvík.

At allir vinnararnir hesa ferð vóru úr høvuðsstaðnum var merkisvert, tí hesa ferð eydnaðist tað ikki manningunum hjá størsta róðrarfelagnum í landinum, Havnar Róðrarfelag, at vinna nakran róður. Hetta var fyrsta ferðin í fýra ár, at tað í einari FM kapping ikki eydnaðist nakrari manning hjá HR at vinna. 2000 var soltið róðrarár hjá størsta róðrarfelagnum. Tá vunnu teir einki FM heiti, og á Ólavsøku hetta árið vunnu teir ongan róður. Síðani hava teir vunnið eitt og fleiri FM heiti á hvørjum ári. Í 2001 var tað Havnarbáturin, sum stóð seg serliga væl og gjørdist meistari, og í 2002 vann Sílið FM bæði við dreingjamanning og gentumanning. Í fjør vóru tað dreingirnir umborð á Sílinum, genturnar umborð á Drekanum og kvinnurnar umborð á Gongurólvi, sum vunnu FM, og ein og fleiri manningar hjá HR vunnu á øllum stevnunum.

HR manningar vunnu fyrr í summar í Klaksvík og á Skálafjørðinum. Tað megnaðu tær ikki á Hvalvík. Men kortini vann høvuðsstaðurin allar seks FM kappingarnar.

Jarnbardur megnaði enn eina ferð at vinna bæði við kvinnum og monnum, og á Argjum var uppaftur størri orsøk at gera burturúr hesa ferð, enn tað var leygardagin frammanundan. Tær tríggjar manningarnar hjá felagnum, sum vunnu á Skálafjørðinum, vóru aftur hesa ferð bestar. Blikur við dreingjum og Blikur við gentum og Argjabáturin. Og so vann Nólsoyingurin kappingina millum 10-mannaførini. Nólsoyingurin heldur til í neystinum hjá Argja Róðrarfelag, og nólsoyingar fingu tvær móttøkur leygardagin. Fyrst vóru teir við í stórfingnu móttøkuni á Argjum, og so vórðu teir móttiknir í Nólsoy.

Ofta hevur tað verið soleiðis, tá ið Nólsoyingurin hevur vunnið, at teir hava róð út til Nólsoyar fyri at fegnast saman við bygdarfólkinum. Leygardagin var ikki hugsningur um at fara um fjørðin við kappróðrarbáti. Men so komu nólsoyingar við maskinbátum inn eftir kappróðrarmanningini.

At høvuðsstaðurin er nógv stinnastur í kappróðrinum sást væl aftur í kappingini millum 10-mannaførini. Nólsoy er partur av Suðurstreymi og nú eisini av høvuðsstaðnum. Teir vunnu róðurin. Havnarbáturin var nummar tvey, og Hoyvíkingur var nummar trý.